FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD | EINAR Á BRÚNNI | LÍNA | 3.695 |
| FD 18 | SIRIÐ | SNELLA | 137 |
| FD 79 | HAVØRNIN | SNELLA | 123 |
| FD 102 | BYLGJAN | SNELLA | 813 |
| FD 123 | RIDDARIN | SNELLA | 193 |
| FD 13 | LAKSURIN | SNELLA | 105 |
| FD 131 | HØGHAMAR | SNELLA | 908 |
| FD 136 | LILJA | SNELLA | 1.509 |
| FD 138 | BYRGI | SNELLA | 1.552 |
| FD 15 | ANNA MARIA | SNELLA | 869 |
| FD 160 | SVANANES | SNELLA | 816 |
| FD 176 | HELEN | LÍNA | 1.757 |
| FD 205 | GRETA | LÍNA | 779 |
| FD 216 | SIGGA | SNELLA | 433 |
| FD 222 | GAMLI EDVARD | SNELLA | 563 |
| FD 229 | CAMILLA | SNELLA | 963 |
| FD 250 | HALGERÐ | LÍNA | 571 |
| FD 267 | SÚLAN | SNELLA | 45 |
| FD 283 | ÁLITIÐ | SNELLA | 214 |
| FD 312 | BRODDUR | SNELLA | 53 |
| FD 322 | KLETTUR | SNELLA | 126 |
| FD 359 | NíSAN | SNELLA | 213 |
| FD 363 | KNÚKUR | SNELLA | 799 |
| FD 377 | JULIA | SNELLA | 1.751 |
| FD 386 | SLÆTTIKLETTUR | SNELLA | 293 |
| FD 406 | ALMA-J | SNELLA | 373 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.799 |
| FD 428 | MARGIT J | LÍNA | 190 |
| FD 437 | MUNKURIN 3 | SNELLA | 548 |
| FD 453 | GØT ÓLA-JÁKUP | LÍNA | 69 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 801 |
| FD 50 | HAVBÚGVIN | SNELLA | 89 |
| FD 508 | HALGAFELLI | SNELLA | 468 |
| FD 530 | NORÐSØKI | SNELLA | 3.789 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 2.934 |
| FD 565 | HANNA | SNELLA | 56 |
| FD 589 | FIMM SYSTRAR | SNELLA | 154 |
| FD 608 | LAMBANES | LÍNA | 293 |
| FD 612 | KNØRRUR | SNELLA | 404 |
| FD 65 | EIK HELGADÓTTIR | SNELLA | 935 |
| FD 660 | FALKURIN | SNELLA | 285 |
| FD 753 | MARIA | SNELLA | 97 |
| FD 761 | GUNNVÁ | SNELLA | 240 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 295 |
| FD 780 | BAKKAFOSSUR | SNELLA | 327 |
| FD 783 | GLÚPUR | LÍNA | 1.754 |
| FD 784 | VÓNIN | SNELLA | 603 |
| FD 80 | NORÐBÚGVIN | SNELLA | 798 |
| FD 808 | ALMA | SNELLA | 580 |
| FD 812 | GEIRHÓLMUR | LÍNA | 2.132 |
| FD 84 | JÓN | SNELLA | 97 |



| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 855 | LÓMUR M/B | SNELLA | 330 |
| FD 863 | HEIDI | SNELLA | 182 |
| FD 900 | HØVNIN | LÍNA | 4.611 |
| FD 905 | TRÚGVI | LÍNA | 1.223 |
| FD 956 | ANJA | SNELLA | 247 |
| FD 968 | SJÓSTJØRNAN | SNELLA | 77 |
| FD1019 | HEGRIN | SNELLA | 785 |
| FD1108 | LUNA | SNELLA | 349 |
| FD1110 | ARCTIC | SNELLA | 369 |
| FD1130 | SJÓBÚGVIN | SNELLA | 183 |
| FD1137 | RIVTANGI | LÍNA | 3.182 |
| FD1140 | EYÐIN | SNELLA | 1.366 |
| FD1142 | DURITA | SNELLA | 102 |
| KG 101 | NEVIÐ | SNELLA | 483 |
| KG 106 | BARIÐ | SNELLA | 1.604 |
| KG 112 | BLÁABERG | SNELLA | 305 |
| KG 123 | HÁENNI | LÍNA | 3.994 |
| KG 125 | BJARNABERG | SNELLA | 254 |
| KG 127 | SKURÐAKLETTUR | LÍNA | 2.086 |
| KG 129 | BRATTABERG | SNELLA | 526 |
| KG 170 | ELJAN | SNELLA | 488 |
| KG 171 | NÚPISKLETTUR | SNELLA | 706 |
| KG 172 | SYÐRATANGI | SNELLA | 628 |
| KG 176 | SVARTBAKUR M/B | SNELLA | 1.296 |
| KG 23 | NANCY | SNELLA | 291 |
| KG 276 | SKORHAMAR | LÍNA | 258 |
| KG 284 | HELLISENDI | LÍNA | 1.171 |
| KG 288 | HELTNIN | LÍNA | 349 |
| KG 290 | REYNSENNIÐ | SNELLA | 257 |
| KG 301 | MÁSASTEINUR | SNELLA | 317 |
| KG 320 | KROSSTEINUR | SNELLA | 395 |
| KG 334 | NORÐAN | LÍNA | 2.420 |
| KG 335 | SKIPALEITI | SNELLA | 421 |
| KG 369 | TURIÐ | LÍNA | 2.734 |
| KG 37 | LION | SNELLA | 637 |
| KG 391 | EYSTURHØVDIÐ | SNELLA | 379 |
| KG 407 | JØKUL | LÍNA | 1.044 |
| KG 423 | JASPISSTEINUR | SNELLA | 720 |
| KG 430 | BÁRAN | LÍNA | 1.607 |
| KG 444 | HEIÐABRÚGV | SNELLA | 223 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 821 |
| KG 47 | HAVSBRÚN | LÍNA | 4.072 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | SNELLA | 233 |
| KG 519 | FYLIGSMOY | SNELLA | 292 |
| KG 522 | SVARTABERG | SNELLA | 865 |
| KG 548 | ELIN H | SNELLA | 571 |
| KG 575 | BIRGIT C. | SNELLA | 208 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 4.742 |
| KG 603 | SJÓFRÚGVIN | SNELLA | 173 |
| KG 608 | HERDIS | SNELLA | 47 |
| KG 63 | POLLUR | SNELLA | 395 |
| KG 640 | HANSA | SNELLA | 454 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 3.286 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 300 |
| KG 666 | SJÓVARFOSSUR | SNELLA | 280 |
| KG 681 | NESTINDUR | SNELLA | 2.776 |
| KG 703 | HENNY | SNELLA | 720 |
| KG 705 | SONJA | SNELLA | 184 |
| KG 706 | SKÝLISKLETTUR | SNELLA | 776 |
| KG 708 | VÁRSÓL | SNELLA | 144 |
| KG 716 | KARIN | SNELLA | 1.504 |
| KG 74 | NESTANGI | SNELLA | 761 |
| KG 740 | HÓPUR | SNELLA | 337 |
| KG 743 | ELSA | SNELLA | 238 |
| KG 744 | OSLA | LÍNA | 2.474 |
| KG 748 | HAVØRNIN | SNELLA | 425 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 1.978 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 700 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 584 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 834 |
| KG 94 | BRID FORD | SNELLA | 291 |
| SA 106 | SVANANES | SNELLA | 252 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 1.973 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 730 |
| SA 26 | BÁRÐARENNI | SNELLA | 246 |
| SA 280 | SNIGÁLVUR | SNELLA | 481 |
| SA 350 | HVESSINGUR | SNELLA | 433 |
| TG 10 | EVI | SNELLA | 269 |
| TG 122 | FRÍÐHILD | SNELLA | 280 |
| TG 147 | HAVRENNINGUR | SNELLA | 300 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| TG 174 | TURIÐ | SNELLA | 454 |
| TG 177 | CONNI | SNELLA | 108 |
| TG 22 | HAVGÁSIN | SNELLA | 261 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 290 |
| TG 262 | LEIF M. | SNELLA | 126 |
| TG 267 | HVÍTIKLETTUR | SNELLA | 404 |
| TG 330 | VÍKINGUR | SNELLA | 270 |
| TG 339 | BÁRAN | SNELLA | 304 |
| TG 347 | KNÚKIN | SNELLA | 498 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 400 |
| TG 360 | RANKIN | SNELLA | 153 |
| TG 40 | KAMBUR | SNELLA | 1.006 |
| TG 435 | JÓRUN | SNELLA | 400 |
| TG 471 | NÚPUR | SNELLA | 323 |
| TG 55 | BLÁABERG | SNELLA | 378 |
| TG 56 | MARIAN M. | SNELLA | 329 |
| TG 576 | SVANUR | SNELLA | 1.196 |
| TG 592 | JENNY B | SNELLA | 354 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 736 |
| TG 608 | RÁAKLETTUR | SNELLA | 345 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 1.059 |
| TG 650 | NÍPAN | SNELLA | 181 |
| TG 670 | VÍKABERG | SNELLA | 402 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 768 |
| TG 797 | NORÐFARIÐ | SNELLA | 62 |
| TG 808 | POUL S. | SNELLA | 678 |
| TN 136 | BÚGVIN | SNELLA | 231 |
| TN 198 | KVÍVÍKS ELSBA | LÍNA | 582 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 405 |
| TN 260 | MONICA | SNELLA | 205 |
| TN 288 | INGA MARETA | SNELLA | 417 |
| TN 339 | HERBORG | LÍNA | 864 |
| TN 390 | TRÝ SYSTKIN | LÍNA | 1.406 |
| TN 417 | GUNBJARTUR | SNELLA | 958 |
| TN 460 | BRATTANES M/B | SNELLA | 595 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 1.639 |
| TN 491 | ÁRAÐI | SNELLA | 125 |
| TN 647 | SÍLIÐ | SNELLA | 43 |
| TN 712 | TEISTAKLETTUR | SNELLA | 202 |
| TN 718 | HVÍTABERG | SNELLA | 721 |
| TN 723 | BRATTASKORÐ | LÍNA | 1.625 |
| TN 728 | PANDY | SNELLA | 700 |
| TN 753 | TÓRA | LÍNA | 1.892 |
| TN 810 | GÓÐIDRANGUR | SNELLA | 639 |
| TN 892 | NØVAN | SNELLA | 639 |
| TN 897 | MAJ-N | SNELLA | 369 |
| TN 912 | HEINE | SNELLA | 120 |
| TN 973 | ANNA KATRINA M/B | SNELLA | 1.140 |
| TN1090 | ANNIKA | LÍNA | 866 |
| VA 109 | ELLA | SNELLA | 120 |
| VA 125 | LÍRABERG | SNELLA | 1.466 |
| VA 135 | HAVFRÚGVIN | SNELLA | 307 |
| VA 141 | ÁLKUKLETTUR M/B | SNELLA | 233 |
| VA 192 | HAVFRÚGVIN | SNELLA | 130 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 153 |
| VA 251 | ELVIRA M/B | SNELLA | 209 |
| VA 269 | ANNA MARIA M/B | SNELLA | 820 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 110 |
| VA 287 | SÓLVÁ | SNELLA | 908 |
| VA 294 | NESTANGI | SNELLA | 222 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 637 |
| VA 327 | FORTUNA M/B | SNELLA | 531 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 322 |
| VA 50 | TØÐUBÓNDIN | SNELLA | 61 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 757 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 258 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 894 |
| VA 88 | SØKIN | SNELLA | 129 |
| VN 132 | TORDIS M/B | SNELLA | 212 |
| VN 136 | SÆVAR | SNELLA | 247 |
| VN 138 | ÓLAVUR | SNELLA | 78 |
| VN 301 | NÓSIN | SNELLA | 187 |
| VN 408 | JÓNVØR | SNELLA | 1.341 |
| VN 430 | RUÐITANGI | SNELLA | 837 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 885 |

# ítróttur

Nr. 57 • hósdagur • 22. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Minnir um ferðina suður á Malta

**Jógvan Martin Olsen heldur, at leygardagin fer trýstið meiri at liggja á Luksemburg enn á føroyingum**

Seint í gjárkvøldið skuldi føroyska landsliðsferðalagið eftir ætlan koma til Luksemburg. Ferðalagið skuldi koma til Keypmannahavnar klokkan 14.15 í gjár. Steðgurin í danska høvuðsstaðnum skuldi vera til kokkan 20.05. Tá skuldi ferðalagið lætta úr Kastrup, og flúgvarin skuldi sambært ferðaætlanini seta seg í Luksemburg klokkan 22.20. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað varð ikki roknað við, at ferðalagið fór at verða á gistingarhúsinum fyrr enn eina ferð eftir midnátt í gjárkvøldið. Gistingarhúsið, har landsliðið fer at halda til inntil sunnumorgunin, eitur INN SIDE Residence–Hotel.

### Einki trýst

Allan Simonsen og útisetarnir í Danmark og Noregi skuldu koma afturat ferðalagnum í Keypmannahavn seinnapartin í gjár.

Millum teirra, sum fóru úr Føroyum klokkan ellivu í gjár, var hjálparvenjarin, Jógvan Martin Olsen. Burtursæð frá dystinum í Sveis í fjør, so hevur hann verið við til allar landsdystirnar síðani 1996. At Jógvan Martin ikki var við í Sveis í fjør komst av, at hann var við U–18 landsliðnum, sum í somu vikuni luttók í EM undankapping í Italia.

Landsdysturin í Luksemburg verður tann 33. hjá Jógvani Martin Olsen sum hjálparvenjari.

– Ferðin til Luksemburg minnir meg nógv á ta ferðna, tá vit fóru suður á Malta, heldur Jógvan Martin Olsen og sipar til 30. apríl í 1997, tá Føroyar vunnu 2–1 í Ta’Qali.

– Ta ferðina galt tað um hjá okkum ikki at tapa. Vit lupu ikki á, men løgdu fyrst og fremst dent á verjupartin. Tað var upp til teirra at prógva, at teir vóru betri enn vit. Teir lupu á, og hóast teir komu á odda, so megnaðu vit at vinna, staðfestir hjálparvenjarin, og hann heldur fram:

– Hesa ferð er tað upp til Luksemburg at vísa, at teir eru betri enn vit. Hjá okkum ræður fyrst og fremst um ikki at tapa. Vit skulu hava stóra virðing fyri teimum og binda um í verjuni. Vit hava áður sæð, at okkara megna at fáa mál í skjótum mótálopum, og eg ivist ikki í, at vit aftur hesa ferð fara at fáa málmøguleikar. Sjálvandi skulu vit á ongan hátt undirmeta Luksemburg. Teir hava onkra ferðina fingið góð úrslit ímóti stórum fótbóltstjóðum, so tað kunnu teir eisini fáa ímóti okkum. Men tað verður fyrst og fremst teirra uppgáva at syrgja fyri undirhaldinum, heldur Jógvan Martin Olsen.

### Valdast um venjingina

Eftir at hava samstarvað við Allani Simonsen í meiri enn fimm ár og í 32 landsdystum man Jógvan Martin Olsen vera tann føroyingurin, sum kennir best til ætlanirnar hjá venjaranum:

– Higartil hava vit bara tosað um úttøkuna. At Allan Mørkøre og Jens Kristian Hansen, sum hava verið á liðnum hvørja ferð, ikki eru tøkir, ber við sær, at onkrar broytingar skulu gerast. Tað eru fleiri møguleikar, men enn havi eg onga hóming av, hvussu venjarin ætlar at seta liðið. Royndirnar eru, at venjingarnar á ferðini hava nógv at siga. Hetta ger seg ikki minst galdandi hesa ferð. Tað er tíðliga á árinum, og sjálvandi eru spælararnir ikki í fullgóðari dystarvenjing. Hesa ferð hava vit ein dag meiri at venja í, enn vit ofta hava, tá vit spæla á útivølli. Tað verður m. a. út frá venjingunum í Luksemburg hósdagin og fríggjadagin, at venjarin fer at seta liðið, sigur Jógvan Martin Olsen.

**jh**



# VÍF kann gerast føroyameistari í kvøld



*Vestmenningar kunnu ogna sær FM-heitið í kvøld um teir megna at basa kollfirðingum*

**VÍF kann tryggja sær føroyameistaraheitið í høllini í Vestmanna í kvøld, um liðið vinnur á KÍF. UM strandingar hinvegin tapa sín dyst móti Kyndli í Havn mikukvøldið, so hevur VÍF eisini tryggjað sær FM-heitið uttan at spæla**

HONDBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

Støðan í fremstu mansdeildini er hon, at VÍF er fimm stig frammanfyri StÍF og hevur spælt ein dyst færri í skrivandi stund. Mikukvøldið spældi StÍF ímóti Kyndli í Havn, og um StÍF tapti tann dystin, so er allur ivi beindur burtur um, hvør gerst føroyameistari í hondbólti í 2001.

Vinnur StÍF hinvegin dystin í Havn, so hava teir mestsum tryggjað sær silvurmerkini.

VÍF hevur tann fyrimunin, at teir kunnu avgera alt sjálvir við at vinna á kollfirðingum hóskvøldið í Vestmanna. Hóast KÍF hevur víst sera gott spæl í seinastu dystunum, so er VÍF stórfavorittur at vinna dystin og harvið føra steypið heimaftur til Vestmanna, har tað sambært vestmenningum hevur sín heimstað.

KÍF hevur lítið annað at spæla fyri enn heiðurin við at vinna á VÍF, men tað verður óivað nóg mikið til at seta kollfirðingar upp til dystin í høllini í Vestmanna í kvøld.